# Kunningarleiðari til Felagið Vágar

**Felagið Vágar er eitt felag sum umboðar ferðavinnuna – handilsvinnuna – og aðrar vinnur.**

Søkt verður eftir einum kunningarleiðara at byrja skjótast tilber.

Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár – leingjan treytað av fígging.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá kunningarleiðaranum eru m.a.**
- at dagføra heimasíðuna hjá felagnum Vágar
- at kunna um Vágar og Mykines
- at marknaðarføra Vágar og Mykines við faldarum o.ø.
- at menna og samskipa handils- og tænastu-vinnuna í økinum
- at kunna um og samskipa tiltøk innan mentan í økinum
- at hava dagligu leiðsluna av felagnum Vágar
- at føra bókhald og hava ábyrgd (fíggjarstýring).

**Kunningarleiðarin skal kunna:**
- arbeiða sjálvstøðugur og hava góð samstarvsevnir
- hava hollan málkunnleika
- hava teldukunnleika
- royndir innan ferðavinnu er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Neinbjørn Nattestad, nevndarformann á tlf. 214021.
Løn samb. avtalu.
Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 9. mai 2005.

**Felagið Vágar**
v/ Neinbjørn Nattestad
370 Miðvágur

# Musikkskúlaskipanin

Hesi størv verða lýst leys at søkja til setanar frá 1. august 2005.

Lærari í messingljóðførum
5 tímar um vikuna á Skála
15 tímar um vikuna í Klaksvíkar Tónlistarskúla

Lærari í messingljóðførum
15 tímar um vikuna í Suðuroyar Musikkskúla

Førleikakrøv: Lokið prógv frá musikkkonservatorium ella tónleikaútbúgving á sama stigi.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Musikklærarafelag.

Umsóknarfreist: 9. mai 2005

Meira fæst at vita hjá leiðaranum á tlf. 316462 / 216462

Umsókn stílast til:



**Musikkskúlaskipanin**
att: Martin Mouritsen, leiðari
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn
Teldupostur: martin@mmr.fo
www.musikkskulin.fo

VESTMANNA KOMMUNA

# Rudding

Vestmanna Kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, ikki skrásett akfør og lutir annars, sum rekast á almennum og privatum øki, skulu ruddast burtur og latast góðkendum móttakara.

Kommunan hevur avtalu við IRF um at taka ímóti ónýtiligum akførum og øðrum lutum.

Sambært grein 61 í ferðslulógini, kann løgreglan beina burtur ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Sambært løgtingslóg um náttúrufriðing, kunngerð um umhvørvisreglur og kunngerð um burturkast er tað ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á privatum uttandura øki, og at lata burturkast, har ímillum ónýtilig akfør, liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðra staðni.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á privatum og almennum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt í seinasta lagi 14. mai 2005, beinir kommunan burtur fyri eigarans rokning.

**Vestmanna Kommuna**
**og**
**Sýslumaðurin**

# Lastbilar til sølu

Scania T112H 6x2, árg. 1985, hevur skiftilastsystem og Palfinger 14080 krana, kranin er frá 1998.

Scania 92H 4x2 árg. 1986, við Hiab 1260 krana, bilurin er góður til eykalutir.

**Sp/f JHR-Entreprenørar**
**fart. 217634**

# Søkt verður eftir

røskum timburmanni og arbeiðsmanni til arbeiði í Keypmannahavn.

**Sp/f AT. H & J**
**André**
**tlf. +45 20716223**

# Bakarasveinur

Okkum tørvar ein raskan bakarasvein. Hevur hetta tín áhuga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

frants restorff

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

# Lutaíbúð á Østerbro, Keypmannahavn

Lutaíbúð á 85 $m^2$ á Østerbro verður **seld pr. 1. juni 2005.** Íbúðin er í rímiliga góðum standi, har baðirúm nýliga er gjørt og nýggj vindeygu eru ísett. Stórt vaskarí og egið kjallararúm eru í íbúðarblokkinum. Eins og íbúðarblokkurin er innilokaður soleiðis at børn frítt kunnu spæla úti í stóra garðinum. Mðr. húsaleiga kr. 3550,- íroknað: fjarhita, breiðband, stórum sjónvarpspakka og frítt vaskarí. Haraftrat kemur: gass og ljós.

Íbúðin liggur í friðaligum umhvørvi. Tætt við Ryparken & Svanemøllen tokstøð. Eisini er tætt við busssamband.

Lutakrónan er í løtuni sera lág í hesum lutafelagnum og tí eru útlit fyri at hon vil vaksa í framtíðini. Keypari hevur møguleika at framleiga íbúðina í 2 ár.

Íbúðin verður seld fult møbleráð. Prísur: 310.000,- kr. fyri sjálva íbúðina og 215.000,- kr. fyri innbúgv. **Íalt: 525.000,- kr.**

Prísurin er fastsettur og kann ikki meglast. Àhugað kunnu skriva til:

**Sosialin**
**box 76**
**110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 079**

# SUMMARFRÍ

**Vit hava stongt frá leygardegnum 30. apríl til fríggjadagin 6. mai kl. 13.00**




TEL 31 52 11

Sosialurin 341800




**Sethúsini Landavegur 31 (við Debesartrøð), matr 1028 Tórshavn**
Húsini eru í 3. hæddum við trimpli og kvisti.
Hvør hæddin er umleið 65 $m^2$. Grundøkið er 450 $m^2$.
Miðhædd: durur/hjallur, gongd, baðirúm, køkur, 2 stovur.
Loft: 4 kømur, baðirúm, lítið goymslurúm.
Kjallarahædd: trappuniðurgongd, kamar, WC við hondvaski, vaskirúm og hjallararúm.
Húsini liggja miðskeiðis í býnum í sera friðarligum og veðurgóðum umhvørvi.
**Verða seld um hóskandi boð fæst.**

***Tlf 313031 og tlf 219100 eftir kl 15.00***

Sosialurin 341800